alment kjak um hennara arbeiði, til tess at tað kann gagna øllum samfelagnum.

Lat meg siga tað her, at undirritaði hevur persónliga einki ímóti Fiskasøluni — hóast eg veit, at Óli Breckmann og hansara líkar, júst vilja fáa tað vent tann vegin.

Afturlatið land!

Uttan mun til mín persón so eru tað fleiri føroyingar, sum gjøgnum árini hava víst sína stóru ónøgd við arbeiði hjá Fiskasøluni. Men sum blaðmaður hevur tú uppdagað, at sjálvt undangongumenn á nógvum økjum og høgt í metum millum fólk, ikki hava **TORAÐ** ALMENT AT ÚTTALA SEG UM Fiskasøluna og hennara arbeiði — hóast tað, at teir í munnligum samrøðum hava víst á heilt óhugnaligar sannroyndir.

Við øðrum orðum — í tínum arbeiði sum blaðmaður stoytir tú mangan ímóti einum múri, tá tú ynskir at fáa ávis viðurskifti hjá Føroya Fiskasølu og hennara arbeiði lýst.

Tað er sum afturlatið land.

Kortini eru tað teir persónar, sum hava torað at sagt sína hugsan. Skulu vit tí hava eitt alment kjak um Fiskasøluna og fiskasølupolitikk yvirhøvur, og haldi eg, at tað er rætt at tríva í okkurt av tí, sum m.a. Trúgvi Johansen skrivaði í bløðunum fyri einum ári síðani.

Trúgvi Johansen er sendifulltrúði hjá Landsstýrinum í Keypmannahavn. Hann hevur annars arbeitt í Suðureuropa í fleiri ár við at selja føroyskan fisk. Sum fakmaður á søluøkinum meti eg tí hansara úttalilsi so álvarslig, at ein blaðmaður — um hann er eitt sindur at sær komin —ikki hevur loyvi til at lata tað fara framvið uttan víðari umrøðu.

Trúgvi Johansen og Fiskasølan

Í greinini skrivar Trúgvi Johansen m.a., at Fiskasølan er konservativ, og at alt er steindeytt á Fiskasøluni. Sjálvur hevur Trúgvi Johansen ongar ábøtur sæð í sølupolitikki, Fiskasølunnar seinastu árini, sum ikki eru provokeraðar ella fyrst framdar av øðrum fyri so at vera tiknar sum uppfinnilsi Fiskasølunnar.

Hann vísir síðani á, at eitt danskt felag, sum keypir ein part av fiskinum frá Føroya Fiskasølu, er farið undir at detailpakka saltfisk til italska marknaðin. Henda møguleika hava føroyingar havt í fleiri ár, men hevur hetta beinleiðis møtt mótstøðu frá Føroya Fiskasølu.

Víðari skrivar Trúgvi Johansen, at Fiskasølan beint móti egnum áhugamálum hevur givið einkarrætt til eitt meira ella minni tilvildarligt felag í Týsklandi at selja allan sín feska fisk, eitt felag, ið gjarna vil diktera prísir og treytir, og sum selur víðari til feløg, sum eru nógv størri.

Eisini vísir hann á, at Fiskasølan hevur alt ov nógvar óneyðugar millumhandlarar.

— Hesin ov stóri og maktfulli stovnurin í føroyska samfelagnum hevur óavmarkað vald at revsa teg, um tú gert móti boðunum, skrivar Trúgvi Johansen at enda.

Skrivingin hjá Trúgva Johansen var harðliga átalað í Dagblaðnum, sjálvandi. Sosialurin royndi at fáa viðmerkingar til málið, men her ynskti Fiskasølan at tiga. Ístaðin klagaði hon Trúgva Johansen fyri landsstýrið.

Detailpakka saltfisk

Meira hendi so ikki!

Til nýliga! Í januar mánaða í ár var eitt umboð fyri donsku fyritøkuna Dancod í Føroyum. Dancod er farið undir at detailpakka saltfisk og keypir m.a. fisk úr Føroyum. Sosialurin hevði eina samrøðu við danan. Hann vísti á, at teir fóru at fáa munandi betri prís fyri detailpakkaða saltfiskin enn fyri sølu av saltfiski »uppá tann gamla mátan«. Uppá fyrispurning um føroyingar áttu at roynt at detailpakka saltfisk segði hann:

— Tað vil altíð vera ein fyrimunur jú meira ein kann gera við ein fisk. Orsøkin til at vit eru farnir undir at detailpakka saltfiskin er tann, at vit halda, at tað ber ikki til í allari framtíð at finna keyparar til tær vanligu saltfiskavørurnar.

Samrøðan stóð í Sosialinum 14. januar í ár. Men enn hevur so eingin havt nakra viðmerking til úttalilsini frá Dancod-umboðsmanninum, hvat eg haldi vera ógvuliga løgið.

Annars havi eg frætt, at Bacalao longu fyri 10 árum síðani fór at detailpakka saltfisk, men royndin varð steðgað. Onkur sigur av Fiskasøluni (eg kann tó ikki vátta hetta).

Kjak um fiskasøluarbeiði

So er tað, at ein spyr seg sjálvan. Er tað nakað um, at Fiskasølan spennir bein fyri nýggjum tiltøkum bæði hjá hennara egnu limum og uttanfyri fyritøkuna og á henda hátt avmarkar møguleikan hjá føroyska samfelagnum at fáa sum best burtur úr fiskaútflutningin — tá er hetta í sær sjálvum ein nóg stór ákæra móti Føroya Fiskasølu.

Hvør av øðrum má liva.

Júst í hesum truplu tíðum, har veiðunøgdirnar minka í hvørjum og har aðrir sum t.d. canadiumenn floyma yvir okkara vanligu marknaðir við biligum fiski — er avgerandi neyðugt, at vit í Føroyum diskutera nýggjar arbeiðshættir, nýggjar góðskuhættir og nýggjar marknaðir fyri at Føroya Fiskasøla og aðrir sølufelagsskapir kunnu liva upp til tey nýggju krøvini og umstøðurnar.

Lat okkum brúka blóðini at skifta orð um tær broyttu umstøðurnar og tey nýggju krøvini — nakað sum Óli Breckmann og hansara fylgisveinar ikki ynskja — men sum Óli Breckmann annars við síni seinastu grein um Fiskasøluna nettupp hevur birt upp undir.

Seinni partur í hesi grein snýr seg um dálkanina av journalistiska handverkinum, sum skrivingin hjá Óla Breckmann hevur verið atvoldin til. Greinin kemur í Sosialin leygardagin.

ialurin man ætla at
út. Teir vilja leggja
slør um teirra sein-
royndi at reka al-
nna forrætning. Hon
ck navnið »vetrarsigl-
g« við eini bilferju,
myril av navni. Hon
kostaði føroyska slit-
manninum (og øðrum før-
oyingum) eitt samlað hal
upp á 35 milj. kr. fyri ári
1980/81.

So sosialistarnir mu
longur út eftir vegn
enn bert til Cuxhaven.
nakar skal trúgva t
pástandi um, at tað e
lætt at selja 80.00
av fiski, sum tað
selja 100 tons ei
ferðir um ári
fj

Atli Dam, formaður javnaðarfloksins:

Sáttmálin við EEC ein »katastrofa«

— Tað er ein »katastrofa« fyri føroyska fiskivinnu at skrivað er undir seinasta sáttmálan við EEC.

Hetta sigur Atli Dam, tingmaður og formaður í Javnaðarflokkinum í eini viðmerking til samráðingarnar, sum júst eru endaðar í Bruxelles.

Atli Dam sigur, at hesin sáttmálin er so nógv verri enn nakar annar sáttmáli, sum føroyingar hava gjørt.

— Her hava føroysku samráðingarmenninir slept so nógvum prinsippum uppá fjall í mun til tær undanfarnu samráðingarnar, at sáttmálin má skýrast ein »katastrofa« fyri framhaldandi veiðu í EEC-sjógvi.

Áttu at bíða

— Men var tað ikki neyðugt hjá okkara samráðingarnevnd at fáa sum frægast burtur úr hesa ferð?

— Eg haldi, at tað var óneyðugt at skriva undir júst í løtuni, tí sum kunnugt hevur danski fiskimálaráðharrin fingið nógv fleiri heimildir við sær, nú hann skal samráðast í Bruxelles í hesi vikuni:

M. a. heimild til at endurskoða fiskifrøðisliga grundarlagið undir toskaveiðu í Grønlandi. Heimild til at endurskoða grundarlagið undir sildaveiðubanninum í Norðsjónum, soleiðis at møguliga verður sildaveiða loyvd.

Har vóru allar grundir til at bíða og til at brúka orkuna uppá at fáa í lag ein fyribils sáttmala, sum gav skipunum loyvi at fiska, meðan vit løgdu leikirnar til komandi samráðingarumfar, ið skuldi geva tann endaliga sáttmálan, til rættis.

— Men svongd Paula Ellefsen er nú atvoldin til at vit komu at sita eftir á berum.



Minstukrøvini

Atli Dam vísir annars á, at áðrenn samráðingarnar í Bruxelles gjørdi Javnaðarflokurin hinum limunum í Marknaðarnevndini greitt, hvørja støðu hann hevði til tey minstukrøv, ið skuldu uppfyllast fyri at skriva undir ein sáttmála.

Dentur varð lagur á, at vit máttu ikki geva út ella slaka mótvegis norðmonnum viðvíkjandi rækjum í Grønlandi. Vit máttu hava lutfallsliga eins nógv sum norðmenn í bæði Vestur-Grønlandi og Eystur-Grønlandi.

Heldur ikki máttu vit góðtaka at fáa minni enn 18.000 tons av makreli. Víst varð eisini á, at støðan viðvíkjandi toski í Eystur-grønlandi júst í løtuni er so mikið ógreið, at hesin spurningurin eigur at verða kannaður gjølla, soleiðis at man ikki kemur at seta seg sjálvan í ta støðu, at aðrir fara við toski í Eystur-grønlandi, meðan føroyingar eru við sviðið soð.

Vit góðtaka ikki!

Haraftrat gjørdi javnaðarflokkurin vart við, at ein undir ongum umstøðum kundi góðtaka, at felagsmarknaðarmenn vilja leggja seg út í føroyska laksaveiðu, so leingi sum tað situr ein laksaveiðunevnd fevnandi um alt norðuratlantshavið. Og so leingi føroyingar eru á ferð við at byggja upp eina laksaveiðu og seta út tað av laksi, sum skal rættvísgera føroysku laksaveiðuna.

Heldur ikki kundi javnaðarflokkurin ganga við til at broyta fiskiveiðureglurnar undir Føroyum meira enn tað sum er neyðugt fyri, at EEC kann veiða sínar kvotur á ein rímiligan og lønsaman hátt.

Semja

Atli Dam upplýsir, at tað stórt sæð var semja í marknaðarnevndini um hesi sjónarmiðini.

— Tað var tí við ógvuliga stórum bilsni, at eg sjálvur merkti mær úrslitini, sum Pauli Ellefsen hevði skrivað undir uppá í Bruxelles.

Eg segði við onkran samgongumann, áðrenn samráðingarnar fóru fram, at eg var bangin fyri, at Pauli Ellefsen í løtuni var ov svangur til, at ein kundi forsvara at senda hann sum okkara umboðsmann til at samráðast í Bruxelles.

— Og tíverri kom hetta at roynast júst so, leggur Atli Dam aftrat. — Pauli Ellefsen tordi ikki at seta seg sjálvan í ta støðu, sum vit so mangan fyrr vóru í, at vit ikki kundu góðtaka sáttmalan. Vit máttu heldur fara heim fyri síðani at koma aftur at royna at fáa ein betri sáttmála.

Sum av torvheiðum

— Tað merkti so, at vit fingu at vita, at vit komu heim sum av torvheiðum. Men vit meintu tað var betri at koma tvær, tríggjar ella fýra ferðir sum av torvheiðum, tá ein visti, at fjórðu ferð fekk ein eitt frægari úrslit.

— Pauli Ellefsen hevur verið svangur, og fyri at sleppa undan hesum kritikki, skrivaði hann undir ein sáttmála, sum á nærum øllum økjum kostaði okkum hesi afturstigini. Lesið eisini á baksíðuni